### NY AUKTION

På Dommerkontoret, C Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes **torsdag den 6. april 1995, kl. 9.20** ny auktion (AS 501/94) over matr. nr. 706 m, Tórshavn beliggende Tórshavn.

Auktionen er begæret af advokat Jógvan Ellefsen, Bryggjubakki 22, Tórshavn, tlf. 1 1260 (j. nr. 36717) på vegne en pant og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus på en 439 kvm stor grund. Det bebyggede areal udgør 100 kvm i 2 etager.

Første auktion afholdtes fredag den 03. marts 1995.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

**Færøernes fogedret,**
*den 3.3.95*
Henrik Engell Rhod
dfm

### TVINGSILSSØLA

**Hósdagin tann 6. apríl 1995, kl. 13.50** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 26 s, Oyri (AS nr. 625/94).**

Ognin er eini setthús á Norðskála, 142 kvm. í kjallara og stovuhædd. Gjørd av timbri og betong og takt við flagi.

Tvingsilssølan er um biðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 941061)**, sum kann geva nærri upplýsingar og sum nærri avtala kann gerast við um ynski er um at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Futarættur,**
*tann 6. mars 1995*
Henrik Engell Rhod
dfm

*Føroya Oljuídnaður saman við Mobil, Statoil og Enterprise:*

# Føroyingar á skeið í oljuvinnu

Føroya Oljuídnaður skipar saman við oljufeløgunum Mobil, Statoil og Enterprise fyri skeiði á Hotel Føroyum 8. mars 1995 frá kl. 9.00-16.30.

Skeiðið ber heitið »Oil Industry Seminar« ella stutt sagt »Skeið í oljuvinnu«, og snýr seg fyrst og fremst um at lýsa aktivitetin, sum fylgir við leitingum eftir olju.

Eitt nú hvørjar vørur, tænastur og umstøður oljufeløgini spyrja eftir, og eisini hvørjar royndir hetlendingar og norðmenn hava av leitiboringum.

Fyribils eru vit téloliga viss um, at feløgini fara at leita eftir olju í Føroyum, og tí halda vit tað vera neyðugt at lýsa oljuleitingarfasuna so gjølla sum gjørligt.

Fyrilestrarnir verða bæði á enskum og norskum máli, men tað eigur ikki at halda nøkrum aftur, sum hevur á huga, tí oljuterminologi á enskum kunnu vit eins væl venja okkum við nú sum seinni.

Fyrilestrahaldararnir eru royndir menn í oljuvinnu. Phil Sands er kunningarstjóri hjá Mobil Oil, og við sær hevur hann m.a. Bill Middlehurst, ið er »Senior Drilling Engineer« (borteknískur stjóri) hjá Mobil. Middlehurst stóð á odda fyri leitiboringum í Írlandi, har eingin skipaður oljuídnaður fanst frammanundan.

Dr. Brian Evamy er kønur í geologi og geofysikk og arbeiðir fyri Enterprise Oil. Bert Fletter havnastjóri í Peterhead, sum er størsta veitingarhavn í Skotlandi, og Bjørn Vidar Lerøen frá Statoil, hevur hevur vitjað í Føroyum áður, virkar sum kunningarstjóri hjá Statoil, verður sagt í tíðindaskrivinum frá Føroya Oljuídnaði.



*Fýra av nevndarlimunum í felagnum Føroya Oljuídnaður. Mynd kalmar*



*Phil Sands frá Mobil Oil, sum fer at halda fyrilestur á skeiðnum. Mynd jan*

## MáF aðalfundur

verður í
**SJÓNLEIKARHÚSINUM**
**leygardagin 8. apríl, kl. 11.00**

Dagsskrá
samb. lógini.

**Nevndin**

# Gott rakstrarúrslit hjá EIMSKIP í 1994




Netto rakstrarúrslit EIMSKIPS í 1994 var 55,7 mill. ella 6% av umsetninginum í mun til 36,8 mill. í 1993. Heildarumsetningurin hjá fyritøkuni var 955,8 mill. í mun til 860,1 í 1993. Hetta er vøkstur uppá 11%.

Eginognin er 516,1 mill. og í lutfalli til samlaðu ognir felagsins 48%.

Hetta góða úrslitið stavar frá:

– Flutningsnøgdin hjá fyritøkuni er vaksin til 1,018 mill. tons.

- Nýtslan av flutningskervinum (skipum, bingjum, amboðum) var sera góð. Økingin í framleiðsluvíðløtur minkandi kostnaðarstøði pr. eind við uml. 4% síðani 1993 ella 14% síðani 1991.

– Nettoyvirskotið av virksemi uttanlands er vaksið við uml. 22% til 153,4 mill.

Starvsfólkatal EIMSKIPS 1994 var umleið 788. Skrivstovurnar eru nú 19 í tali í 11 londum í Europa og Amerika. EIMSKIP hevur nú 10 skip í rakstri.

## Ogn til sølu

Ognin matr. nr. 152, Tórshavn, ið liggur úti á Bakka – uttan fyri gomlu WP-smiðjuna – verður við hesum lýst til sølu, um nóg høgt boð fæst.

Áhugað kunnu vend sær til

**ADVOKATFELAGIÐ**
**Leif Waagstein**
**Dánjal Magnussen**
**Tormóður Djurhuus**
**Jógvan P. Lassen**
**Petur E. Djurhuus**
**Jógvan E. Ellefsen**
**Bryggjubakki 22**
**110 Tórshavn - Tlf. 11260 - Fax 11261**

## Eyðkvæmislinjan

svarar alt samdøgrið á tlf. 18820.
Mikudagar kl. 19.00–21.00 fæst persónlig ráðgeving og serligir spurningar verða svaraðir.